# Jónas Broncksgøta 5 til sølu



Við hesum verður ognin matr. nr. 526 1, Tórshavn, lýst til sølu. Talan er um ein eldri bygning frá umleið 1950, ið stendur sera væl fyri í Tórshavn. Bygningurin er í trimum hæddum, sum í høvuðsheitum hevur verið nýttur til skrivstovuhølir. Grundstykkið er 738 $m^2$, meðan bygningurin er í alt 294,7 $m^2$.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til skrivstovu okkara.

**Advokatfirma Annfinn V. Hansen**
Bryggjubakki 22 · Boks 106
FO-110 Tórshavn
Telf. 359595 · Fax 359596
E-mail: advokat@advokat.fo

# Ídnaðarøki á Hjalla til sølu



Við hesum verður ídnaðarøkið matr. nr. 1od, Hoyvík, lýst til sølu. Økið er planerað og byggibúgvið, 8.112 $m^2$ til støddar.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til:

**Advokatfirma Annfinn V. Hansen**
Bryggjubakki 22 · Boks 106
FO-110 Tórshavn
Telf. 359595 · Fax 359596
E-mail: advokat@advokat.fo

# Havnar Arbeiðskvinnufelag

Skrivstovan er stongd til og við 7. juli.

**Nevndin**

# Endurlýsing

## av deildarleiðarastarvi á Familjudeildini á Føroya Barnaheimi

Vegna ov fáar umsóknir, verður deildarleiðarastarvið á Familjudeildini endurlýst. Starvið verður leyst til setan frá 1. oktober 2006 ella skjótast tilber.

**Um Familjudeildina:**
Á Familjudeildini arbeiða 7 starvsfólk í einum tvørfakligum toymi, øll við viðkomandi útbúgving.

Endamálið við arbeiðnum á Familjudeildini er, at foreldrini verða styrkt og stuðlað í at vera foreldur, soleiðis at familjan kann virka betur sum ein heild. Eisini er endamálið at fáa greiðu á, hvørjar styrkir og hvørjar trupuleikar familjan hevur, og í hesum sambandi meta um, hvør stuðul er best og mest viðkomandi at veita familjuni framyvir.

**Førleikakrøv til deildarleiðarastarvið:**
Vit sóknast eftir einum dugnaligum deildarleiðara, ið hevur royndir við familjuarbeiði og sum somuleiðis hevur leiðsluroyndir. Tað er umráðandi, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni og er til reiðar at ganga fremst í tí fakliga arbeiðnum á deildini. Harumframt hevur deildarleiðarin ábyrgdina av og skipar samskiftið við barnaverndartænastur, Almannastovuna, heilsusystrar, læknar, sálarfrøðingar, sosialráðgevarar, barnagarðar, skúlar, sjúkrahús, viðgerðarstovnar o.s.fr.

Á Familjudeildini verður í løtini arbeitt við at víðka og broyta virksemið á Familjudeildini og skal deildarleiðarin somuleiðis standa á odda fyri hesum arbeiði.

**Útbúgving:**
Hóskandi útbúgving krevst.

**Løn:**
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 4. august 2006.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Beintu Johannesen, leiðara á tlf. 312320

**Føroya Barnaheim**
Pedda vid Steinsgøta 10
FO-100 Tórshavn

# Lærarastarv í Sumbiar skúla

Søkt verður eftir lærara skúlaárið 2006/2007.

Førleikakrav: skal kunna undirvísa í svimjing 2 tímar um vikuna.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4

Umsóknir skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 11. juli.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran á tlf. 573875, teldupostur: arnfinnur.bjarkhamar@skulin.fo

SJÓVAR KOMMUNA

# Starvsfólk til nýggja dagstovnin í Sjóvar kommunu

**Sjóvar kommuna søkir eftir:**
- 1 varaleiðara
- pedagogum
- hjálparfólkum
- vaskifólki
- 1 køkshjálp

at byrja 1. november 2006.

Dagstovnurin verður opin millum kl. 7.00 og 17.15.

**Um stovnin:**
Dagstovnurin, ið er normeraður til 84 børn, hevur 2 vøggustovur, 2 barnagarðsstovur og eina frítíðarstovu. Hvør stova, sum er væl útgjørd, hevur sína egnu inngongd. Eitt stórt felagsrúm, serstovur, viðtaluhølir og ymisk onnur hølir, sum kunnu nýtast til eitt hvørt.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt áhugavert starv, í einum umhvørvi tætt við náttúruna, har tú saman við góðum starvsfelagum fært møguleika at seta tín dám á stovnin og fært møguleikan at byggja upp eitt spennandi pedagogiskt umhvørvi á hesum nýggja stovni.

**Vit ynskja at umsøkjararnir:**
- Eru til reiðar at fara virknir inn í starvið og saman við sínum starvsfeløgum menna tað pedagogiska arbeiðið á stovninum
- Hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- Kunnu taka ábyrgd og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og skúlan
- Síggja møguleikar og avbjóðingar, sum eru í nærumhvørvinum
- Hava hugsjónir, tá tað snýr seg um virksemi í einum dagstovni.

**Setanarviðurskifti:**
Løn og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum, skal vera

**Sjóvar kommunu**
Att. Sonlis S. Høj Joensen
Skúlavegur 10
490 Strendur

í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 21. juli 2006.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Sonlis S. Høj Joensen, leiðara á tlf. 219445.

Um ikki nóg nógvir pedagogar søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.